## DAGSINS MEINING

# Kapping og avbjóðing

Føroysk blaðútgáva hevur ongantíð verið tann gullrandaða forrætningin, hóast undantøk hava verið. Marknaðurin er avmarkaður bæði hvat lesarum og lýsarum viðvíkur, og tá íløgur og rakstur kortini krevja nógv, hevur tað verið ringt hjá mongum av bløðunum gjøgnum tíðirnar at fáa endarnar at røkka saman. Kortini verður roynt at fáa bløð út, onkur hvønn gerandisdag og onnur nakrar ferðir um vikuna, mánaðin ella árið. Onkur av bløðunum hava yvirlivað, meðan onnur hava verið fyri blaðdeyðanum. Seinast so var, var tá vikublaðið Fregnir mátti stongja. Slíkt ger sjálvandi blaðmarknaðin minni og harvið eisini minni spennandi. Men hetta eru so treytirnar í eini fríari kapping. Hækkandi útreiðslur og harða kappingin um lýsingarnar, her ikki minst eisini við alment stuðlaðu loftmiðlarnar, ger tað trupulari hjá verandi bløðum at halda tørn og ger tað eisini uppaftur truplari hjá nýggjum blaðspírum at vaksa og fáa fast undir fótum.

Innan fyri stutta tíð eru komin tvey nýggj bløð,"Kvinna" og "Vinnuvitan". Bæði tvey venda sær til ávísar bólkar, um man kann siga tað so. Kvinnublaðið sjálvsagt fyrst og fremst til kvinnur, meðan Vinnuvitan leggur seg eftir fólki við áhuga fyri vinnulívinum . Enn er so bert eitt nummar útkomið av hesum bløðum, sum skulu koma út ávikavist seks ferðir um árið og aðruhvørja viku.

Lat okkum fyrst ynskja bløðunum vælkomin á blaðmarknaðin. Tað er altíð hugaligt við nýggjum spírum tó at hetta herðir kappingina um bæði lesarar og lýsarar. Ein kann so spyrja, um pláss er fyri øllum verandi bløðunum og teimum nýggju, hóast hesi ikki hava júst somu brúkarabólkar. Neyvan fer sølan av dagbløðunum, ið bera tíðindi hvønn dag, at minka nevnivert. Men tað kann ganga út yvir lýsingarnar. Og tá hugsað verður um, at dagbløðini longu eru við sviðiðsoð orsakað av, at tað verður loyvt loftmiðlunum, eitt nú Útvarpi Føroya at lýsa við handilslýsingum, hóast hesir miðlar fáa bæði kravt lurtara- og hyggjaragjald, umframt at tað almenna rindar teirra sendinet. Hetta er unfair kapping. Ja tað er kappingaravlagandi, at serliga Útvarp Føroya skal sleppa at fíggja sítt virksemi við handilslýsingum.

Henda sannroynd og nýggj bløð kunnu gera tað torførari hjá dagbløðunum at fáa endarnar at røkka saman, bløð, sum hvør uppá sín hátt brúka nógva orku og pengar uppá at royna at liva upp til tær puplic service skyldur, sum allir miðlar eiga at kenna ábyrgd av so ella so. Hvat innihaldinum viðvíkur, so hava vit øll brúk fyri kapping. Hetta fær okkum so eisini til at gera okkum størri ómak og taka kappingina upp við nýggju bløðini. Vinnutíðini hava altíð verið ein náttúrligur partur av hesum blaðnum, men einki stendur í stað, og til ber altíð at gera tingini betri. Kapping fær ein eisini til at taka í egnan barm. Og tað er m.a. hetta vit eru farnir í holt við, tá vit serstakliga seta fokus á vinnutilfarið í mikudagsblaðnum. Sum so er hetta einki nýtt. Vit hava gjørt tað áður og hava heiti verið sum "Vit vitja virki", "Miðvíkan" og "Vinna". Vit sanna, at meira kann vera gjørt við vinnutilfarið, bæði tað lættara og tað tyngra. Tískil koma Vinnusíðurnar at gerast ein náturligur partur av blaðnum í framtíðini, og tað skal vera vón okkara, at lesarar og lýsarar taka undir við hesum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eisini á síðu 24, Sjúrður Skaale!

**Páll Poulsen**



Sjúrður Skaale roynir í grein at tileinkisgera fakligan kritikk av køkuni hjá "Norðuratlantsbólkinum". Hetta kemur hann illa frá, tí talan er um upplýsingar sum ikki passa.

Tá ið tú gevur keldusavn ella søgubøkur út, er alfa og omega at upplýsingarnir eru rættir. Eru fleiri feilir, útstillar høvundin seg sjálvan fram um alt annað. Tí universell virði skulu eisini viðgerast á metaniveau, og privatu viðurskiftini hjá høvundunum og hvat teir annars halda um seg sjálvar telja ikki. At bagatellisera egnar miserur er óføroyskt. Bókin er á donskum, skulu danir aftur trúgva tí sum ikki passar?

Tað nyttar einki at argumentera við umrøðu í pressuni. Hvørki her ella har. Tí tað merkir bara at onkur hevur góðar kontaktir at trýsta á. Tann fantastiski Ole Espersen kemur ongantíð at hjálpa okkum, tí hann stríddist ímóti grønlendingum, sí FF-Blaðið.

Harafturat var Espersen opponentur hjá Harhoff Dr. Jur., og við hesum stempli fyri hansara í støðum villeiðandi viðgerð av føroyskum, donskum og eisini íslendskum viðurskiftum. Ein tílíkur professari, doktari og fyrrv. løgmálaráðharri Danmarkar vil okkum einki gott. "Den førende danske ekspert i folkeret", kalla teir Harhoff.

Men tað eg skuldi siga, var at á síðu 24 stendur: "Færøerne er ved at blive besat af England," og tað sigur alt um restina. Send hatta til "The Scottish National Party".

# Góðu viðskiftafólk




Staðfestast skal her verða, at vit eru á røttu leið, innan príspolitik. Málið hjá Valdemar Lützen byggibúð er at bjóða nettoprísir til allar kundar okkara. Hetta fyri at geva kundanum eina klára mynd av hvat vøran kostar. Onki fjas við at dylja ein høgan søluprís, við avslátrar prísum til nøkur, meðan summi, ið ikki vilja megla um vøruprísin ið stendur á vøruni, mugu gjalda høga prísin.

Nei. Vit kunnu nú bert staðfesta, at Valdemar Lützen byggibúð hevur sett dagsordanin við nettoprísum. Og tað er gleðiligt at kappingarneytar mugu fylgja við, við prísniðursetan við heili 25%. Tað vísir, at onkur hevur vunnið nógv uppá vørurnar áðrenn hesa prísniðursetan.

Við hesum skrivi vilja vit bert staðfesta fyri øllum kundum okkara, at Prísgaranti okkara heldur áfram. Vit vilja vera bíligast á marknaðinum. Tí vilja vit framvegis gera prískanningar og heingja tær upp í handli okkara, soleiðis at kundin lætt kann fylgja við í dagsins prísstøði. Í síðsta enda er tað jú kundin, ið vinnur uppá hetta.

Í sambandi við 100 ára haldið hjá P/F Valdemar Lützen í desembur, bjóða vit MVG frían mánaða. Hetta merkir, at vit gjalda MVG`ið fyri kundan, við at draga MVG`ið av vøruprísunum, við kassan.

Her kann ein veruliga gera kvettið við at koma oman í Fríhavnina.

Vit hava valt ikki at svara Toll & Skatt aftur uppá teirra heldur annaðleiðis útspæl, um MVG fríu søluna. Vit vilja bert staðfesta, at sjálvandi skulu øll gjalda MVG (eisini vit). Tað burdu Toll & Skatt ikki ivast í.

Vit hava bara valt, at gjalda MVG`ið fyri kundan allan desember mánaða. Tað er jú ikki hvønn dag ein fyritøka fyllur 100 ár. Tað skal feirast.

Samstundis vilja vit ynskja øllum viðskiftafólkum okkara eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Vinarliga

**Høgni Lützen**
*Valdemar Lützen*
*byggibúð*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**

Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.